# Summi fáa meiri og onnur fáa minni

**Strandferðslan er farin at fyrireika ferðaætlanina, sum skal vera í gildið tað komandi árið og nú vil stovnurin hava viðmerkingar til ætlanina**

FERÐAÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Summi smápláss fáa betri ferðasamband og summi fáa verri, nú Strandferðslan er í ferð við at leggja nýggja ferðaætlan*

– Vit royna at fáa meiri fyri sama pening.

Tað er hetta, sum Strandferðslan hevur lagt seg eftir, nú hon er farin at fyrireika nýggju ferðaætlanina, sum skal koma í gildið í summar og sum sostatt skal verða galdandi tað næsta árið.

Strandferðslan hevur gjørt eitt uppskot til nýggja feðaætlan og tað uppskotið liggur nú frammi, so at stovnurin kann fáa viðmerkingar til uppskotið.

Andrass Jensen, ferðafólkaleiðari á Strandferðsluni, sigur, at tað eru ikki tær stóru broytingar, sum ætlanin er at gera í nýggju ferðaætlanini.

– Vit hava funnið ein leist, sum ferðaætlanin verður løgd eftir. Ferðaætlanin er løgd í eima hampiliga fasta legu, sum vit halda riggar nokk so væl. Sostatt er tað ikki tær stóru broytingarnar, sum eru gjørdar, sigur ferðafólkaleiðarin.

Kortini eru ymsar tillagingar gjørdar, sigur hann.

– Talan kann vera um ynski, sum eru komin ymsastaðni frá um at broyta fráferðir fyri at fáa eina farleið at passa betri og at samsvara betri við aðrar leiðir.

Men tann mest týðandi broytingin er, at onkrar smábygdir mist onkrar túrar við Bygdaleiðum, tí vit halda ikki, at grundarlag er fyri teimum.

– Vit hava hugt eftir, hvussu nógv fólk eru við ymsar túrar hjá Bygdaleiðum og í tí sambandi hava vit broytt koyringina tilsvarandi við at leggja ávísar túrar burtur.

### Fáa betri samband

Andrass Jensen sigur, at hinvegin eru tað onnur, sum hava fingið betri ferðasamband, enn tey hava havt higartil.

Hann sigur í hesum sambandi, at ymsar útoyggjar hava fingið betri samband, enn tær hava havt við tað, at fastir túrar eru lagdir inn, sum ikki hava verið áður.

– Vit hava roynt at veita útoyggjunum eina betri tænastu. Samanumtikið hava vit roynt at fáa meiri fyri pengarnar við at leggja túrar eftir, hvar teir gera best gagn. Í hesum sambandi hevur Strandferðslan eisini hugt eftir, hvussu fólkasamansetingin á ymsum plássum er og hon hevur roynt at laga ferðaætlanina eftir, har eitt nú, har ung húski við børnum eru.

Eitt dømi um hetta er Nolsoy, sum hevur fingið onkrar fastan túr afturat. Sostatt hava nolsoyingar fingið ein fastan túr afturat á miðdegi sunnudag. Men eisini svínoyingar hava fingið betri samband.

Kortini vísir hann á, at enn er ógreitt, hvussu siglingin verður um Leirvíksfjørð. Eitt nú er ógreitt, hvussu nógv Ternan fer at sigla afturat Dúgvuni.

Somuleiðis hevur Strandferðslan gjørt vart við, at tá ið nýggi Smyril kemur í oktober, verður ferðaætlanin ímillum Suðuroynna og Havnina kanska broytt. Somuleiðis er viðmerkt, at siglingin út í Kalsoy verður broytt, tá ið nýggja ferjulegan verður tikin í nýtslu um árskiftið.

Men hann leggur kortini dent á, at enn er ongin avgerð tikin um at broyta ferðaætlanina ella um, at nýggi Smyril fer at sigla fleiri túrar.

– Tað er fyri at binda um heilan fingur, at vit longu nú gera vart við, at ferðaætlanin kann verða broytt, tá ið nýggi Smyril kemur.

Andrass Jensen leggur kortini dent á, at enn er ferðaætlanin til hoyringar, so enn er onki avgjørt.

# Sumbingar heiðraðir fyri føroyskan dans

**Lions- klubburin í Suðuroy hevur stuðlað Sumbiar Dansifelag í arbeiði teirra at varðveita og kunna um føroyskan dans**

HEIÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sumbingar hava altíð verið tiltiknir kvøðarar. Teir hava eitt heilt sermerkt dansilag og ikki skerst burtur, at teir hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at varðveita og menna okkara ein av okkara fremsta mentanararvum, kvæðini, vísurnar og tann føroyska dansin.

Hetta arbeiðið hevur Lions Klubburin í Suðuroy nú stuðlað.

Á lítlari samkomu á gistingarhúsinum í Øravík herfyri, handaði Lionsklubburin í Suðuroy Sumbiar Dansifelag ein kekk upp á 10.000 krónur. Avgerðin um at stuðla Sumbiar Dansifelag, tók Lions klubburin í Suðuroy eftir at teir høvdu havt Lions - limir úr Íslandi á vitjan seinasta summar.

Tá dansaðu sumbingar føroyskan dans fyri teimum ógvuliga hugtiknu íslendingunum og tað vóru eisini onkrir íslendingar, sum royndu seg uppií.




# Terji Rasmussen og hansara menn spæla aftur í Suðuroy

**Leygarkvøldið spælir Terji Rasmussen Band til stóran dans í Roynhøllini í Hvalba**

DANSUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Terji Rasmussen er ein av okkara allarbest umtóktu tónleikarum.

Men tað er ikki ofta, at suðuroyingar hava høvi til at hoyra hann og hansara orkestur við frálíkum tóneikarum.

Men hetta leygarkvøldið verður eitt undantak.

Leygarkvøldið fer Terji Rasmussen Band at spæla til dans í Roynhøllini í Hvalba.

Í sambandi við dansin koyra MP - Bussar av Statoil á Tvøroyri á midnátt til Hvalbiar.

Tónleikurin, sum Terji Rasmussen og hansara menn spæla, spennir rættiliga víða.

Eyðvitað spæla teir løg, sum teir sjálvir hava gjørt og sum eru kend frá Terja og Føstufrensum.



*Hetta leygarkvøldið fáa suðuroyingar eitt sjáldsamt høvi til at hoyra Terja Rasmussen og hansara men spæla til dans. Teir hava eina fjølbroytta skrá, sum spennir heilt frá Frændum og Terja og Føstufrensum, til Robbie Williams og Limp Bizkit*

Men teir spæla eisini løg eftir Frændum, sum Terji eisini hevur sungið og spælt við. Og fara vit í tann útlendska básin, eru løg eftir bæði Robbie Williams og Limp Bizkit á skránni, umframt tónleikur eftir øðrum, kendum nøvnum.

Teir, sum spæla við Terja, eru nakrir av okkara frægastu tónleikarum. Rógvi á Rógvu spælir trummur, Arnold Ludvig spælir bass, Magnus Johannesen, tangentar og Búi Dam spælir guitar.



# Eigaraíbúðir ganga sum heitt breyð

**Íbúðirnar í Berjabrekku 3 byggistiginum ganga sum heitt breyð, sigur byggimeistarin Høgni Mikkelsen, sum ikki sigur seg merkja nakað til ringar tíðir**

ÍBÚÐARBYGGING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Byggimeistarin á Berjabrekku 3, Høgni Mikkelsen, sigur áhugan fyri nýggju eigaraíbúðunum vera ovurhonds stóran*

*Mynd: Terji Nielsen*

Koyrir tú tær ein túr niðan eftir Sundsvegnum í Havn og niðan móti Berjabrekku, sært tú beinan vegin at farið undir triðja byggistig av eigaraíbúðum á Berjabrekku. Tað er byggimeistarin, Høgni Mikkelsen, ið stendur fyri byggingini, og íbúðirnar ganga sum heitt breyð.

framman undan at farið var undir at skriva upp, sigur byggimeistarin, sum dagliga fær fyrispurningar frá fólki um íbúðir. Áhugin er sera stórur, sigur hann, og fólk spyrja hann eisini um, hvat ið tað næsta verður, sum hann fer í holt við av íbúðarbygging.

Ringu tíðirnar, sum nógv hevur verið tosað um í miðlunum, sigur byggimeistarin seg ikki merkja nakað til, og hann heldur, at fjølmiðlarnar ofta gera tíðirnar nógv verri, enn tær í veruleikanum eru. Sambært Høgna Mikkelsen vísir tað seg eisini, at øll fólkini, ið biða um íbúð, hava fingið fígging og øll onnur viðurskiftir upp á pláss, og hann merkir so einki til, at fólk hava ringt við at fáa fígging.

### Næstan allar avlagdar

Í Berjabrekku 3 byggistiginum eru 68 eigaraíbúðir, og av teimum eru longu tær 54 avlagdar, sigur Høgni Mikkelsen. Farið varð undir at skriva fólk upp til íbúðirnar um ólavsøkumundið seinasta ár, og Høgni Mikkelsen sigur, at ein rúgva av íbúðunum fóru beinanvegin. Fólk ringdu langa tíð

### Nógv tilkomið fólk

Høgni Mikkelsen sigur, at tað eru fólk í øllum aldri, ið hava lagt sær íbúð av, men serliga stórur hevur áhugin verið millum tilkomin fólk, sum eru um tey 50-60 árini. Tó er eisini fitt av ungum fólki, ið hevur biðið um eina íbúð. Eisini eru tað nógv støk fólk, ið hava bílagt sær eina av teimum minnu íbúðunum, sigur Høgni Mikkelsen.

Íbúðirnar eru í trimum støddum. Tær størstu íbúðirnar eru 125 fermetrar, meðan tær smærru eru ávíkavist 63 og 75 fermetrar. Høgni Mikkelsen sigur, at tær størstu íbúðirnar upp á 125 fermetar, ið eru átta í tali, eru allar farnar, og somuleiðis er bróðurparturin av teimum 24 íbúðunum á 63 fermetrar farnar. Sambært byggimeistaranum vísir tað seg, at fleiri og fleiri eru áhugaði í at hava okkurt minni at búgva í, tí tey tíma ikki at hava so nógv at fara um, sigur hann.

### Alt liðugt síðst í komandi ári

Arbeiðið við at byggja nýggju íbúðirnar er væl ávegis. Í løtuni er tað betongarbeiði, ið verður gjørt, men um stutt tíð fara timburmenninir eisini í gongd. Fyrstu íbúgvarnir á Berjabrekku 3 flyta væntandi inn í íbúðirnar í heyst, men Høgni Mikkelsen sigur, at tað veldst alt um, hvussu vorðið er við økinum kring íbúðirnar. Hann ætlar ikki, at fólk skulu flyta inn, áðrenn tunga ferðslan við lastbilum og gravimaskinum er av, tí tað kann man ikki bjóða fólki, heldur hann. Tað skal verða hampuligt at koma til og frá íbúðunum, áðrenn nakar flytur inn, sigur byggimeistarin. Alt arbeiði á Berjabrekku 3 verður væntandi liðugt seinast í komandi ári, sigur Høgni Mikkelsen.

Sum sagt er tað Sp/f Høgni Mikkelsen, ið stendur fyri arbeiðinum í samstarvi við Articon, HMP Consult, p/f Einar Mikkelsen, Arkitektavirkið Magnus Hansen, Havnar Timburhandil og Føroya Sparikassa. Arbeiðið upp á Berjabrekku 3 gevur arbeiði til gott og væl 30 mans, harav teir 13 starvast hjá Høgna Mikkelsen sjálvum.



*Soleiðis er ætlanin, at Berjabrekka 3 kemur at síggja út, tá alt arbeiðið er liðugt*

# Sethúsaprísurin ikki á veg niður

**Hjá fyritøkuni Húsamekling í Havn, sum fæst við keyp og sølu av húsum, siga tey seg ikki síggja nakrar ábendingar um, at sethúsaprísirnir eru á veg niður**

SETHÚSAMARKNAÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nógv hevur verið tosað um ringu tíðirnar, ið sigast verða í væntu her á landi. Ringar tíðir merkja sum oftast eisini fallandi húsaprísir, men hjá Húsamekling merkja tey einki til fallandi sethúsaprísir.

### Áhugin ikki minkandi

Á skrivstovuni hjá sethúsasøluni Húsamekling í Havn siga tey, at áhugin fyri húsum er minst líka stórur, sum hann hevur verið seinnu árini. Stórur áhugi er fyri sethúsum, og serliga tey nýggjaru húsini er løtt at sleppa av við, verður sagt hjá Húsamekling. Eitt sindur eldri hús er ofta eitt sindur longri tíð á sølulistanum enn tey nýggju, men tey húsini, ið hava tvær íbúðir, verða ógvuliga skjótt seld, siga tey á Húsamekling.

Serliga í Havnini er tað lætt at sleppa av við hús, verður sagt, meðan tað gongur eitt sindur meiri striltið í onkrum øðrum øki í landinum, har arbeiðsmarknaðurin er eitt sindur meiri óstøðugur, soleiðis hevur tað tó verið í longri tíð. Hjá Húsamekling hava tey úr at gera, og tey duga sum sagt als ikki at síggja nøkur tekin í sól og mána um, at sethúsamarknaðurin í Føroyum er á veg niðureftir.